gult24 cyan24 magenta24 svart24





*Umleið 20 felagsskapir og samfeløg luttøku í framsýningini um trúboðan*

*Mynd: Judith Johannesen*

# Herfólk Harrans heima og burturi

**Á samfelagsstevnuni á Skálafjørðinum á páskum tosaði Øssur Berghamar um trúboðanarsøguna hjá brøðrasamkomunum í Føroyum og møguleikar fyri trúboðan**

TRÚBOÐAN
*Jóannes Hansen*

Ein óræddur hermaður Harrans. Hesi orðini standa á einum gravsteini í Gamla kirkjugarði í Havnini. Steinurin stendur á grøvini hjá D. J. Danielsen ella Dollanum, sum hann varð nevndur. Hann var havnarmaður og livdi frá 1871 og til 1916. At frammanfyri nevndu orð komu á gravsteinin mundi komast av, at hann var tann fyrsti føroyski ytri missionerurin. Í fleiri ár var hann í einari sjómansmissión, og síðani í Kongo-Balolo missiónini í Afrika. Hann var maskinmeistari á einum missiónsbáti á Kongoánni og kunngjørdi samstundis evangeliið.

Í 1904, tá hann var 33 ára gamal, kom hann aftur til Føroya, tí hann var merktur av malaria. Hann arbeiddi í Føroyum seinastu tólv árini, og vit venda aftur til hansara.

Millum mongu kristiligu tiltøkini, sum vóru kring landið á páskum, skipaðu brøðrasamkomurnar kring Skálafjørðin fyri einari missiónsstevnu ella einari stevnu um trúboðan, sum tað varð nevnt. Umframt møtir og samkomur varð skipað fyri einari framsýning, har umleið 20 felagsskapir og samfeløg, sum eru innanfyri føroysku samkomurnar, sýndu fram. Mett verður, at frá tí at framsýngin lat upp langa fríggjadag og inntil hon lat aftur 2. páskadag, varð hon vitjað av umleið tvey túsund fólkum.

Ein av luttakarunum á stevnuni var Øssur Berghamar. Í næstan 28 ár hevur hann verið trúboðari millum føroyingar í Keypmannahavn. Hansara leiklutur á stevnuni var millum annað at lýsa trúboðanarsøguna hjá samkomunum og møguleikar fyri trúboðan.

– Framsýningin sýndi, at møguleikarnir eru óteljandi. Eg haldi, at legurnar í Zarepta hava verið eitt ógvuliga týdningarmikið trúboðanarverk í eina triðings øld, og vit kundu t. d. nevnt trúboðanina í skrivaða orðinum, útvarpi, sjónvarpi og á so ógvuliga mangar mátar - bæði burturi og heima. Men tá alt kemur til alt, so eru tað umvend og yvirgivin menniskju, sum í hjarta og sinni eru gripin av boðskapinum um frelsu í Kristi Jesusar blóði, ið kunnu gera nýtslu av øllum amboðunum, staðfestir Øssur Berghamar, tá vit spyrja hann um møguleikarnar.

## Nýtt ættarlið fyri tríati árum síðani

Tá vit fregnast eftir trúboðanarsøguna hjá brøðrasamkomunum í Føroyum, vísir Øssur Berghamar á, at tað serliga hevur verið tey seinastu tríati árini, at trúboðarar eru farnir frá samkomunum og í fremmand lond at kunngera gleðiboðskapin:

– Gamli Sloan, sum var skoti, var fyrsti trúboðarin í Føroyum. Av tí, sum hann sáaði, komu fólk til trúgv og samkomur vórðu grundaðar. Fyrrapartin av 20. øld vóru Andrew Sloan og Victor Danielsen kendir trúboðarar í Føroyum, og frá umleið 1960 fóru aðrir at arbeiða sum fulltíðar trúboðarar í Føroyum, t. d. Zacharias Zachariassen í Gøtu og Brynleif Hansen, sáli, sum var ættaður úr Fuglafirði, og sum var undangongumaður fyri legunum í Zarepta.

Hetta eru trúboðarar, sum hava arbeitt og arbeiða í Føroyum, og aðrir eru komnir síðani. Tá tað snýr seg um føroyskar trúboðarar aðra staðni greiðir Øssur Berghamar soleiðis frá:

– D. J. Danielsen ella Dollin var nevndur. Frá tí at hann legði frá sær og fram til umleið 1970 fór eingin úr føroysku brøðrasamkomunum aðra staðni fyri at brúka alla sína tíð í trúboðanarverki. Fyri 40-45 árum síðani gav Petur Háberg, sáli, eitt tíðarrit út, sum hann nevndi Lív og læru. Í 1961 skrivar Zacharias Zachariassen, sum tá var á bíbliuskúla í Onglandi, so rannsakandi, so rannsakandi um henda spurningin. Tað gjørdi hann, beint eftir at Victor Danielsen var deyður. Zacharias skrivar: " Hugsa um hetta: Í meiri enn 40 ár er eingin føroyingur í samkomuni stigin fult út fyri Kristus. Eitt tómt pláss. Eitt varskóskot".

– Eg havi ikki nágreiniliga talið á teimum, sum síðani tá eru farin úr samkomunum í Føroyum við tí endamáli at kunngera gleðiboðskapin fyri fremmandum fólkum og fólkasløgum, men tey eru mong. Nú eru trúboðarar í Íslandi, Eysturgrønlandi, Vesturgrønlandi, Suðurgrønlandi, Danmark, USA, Meksiko, Venesuela, Guinea í Vesturafrika, Senegal, Papua Nyguinea, Sorimi, Filipsoyggjunum, Russlandi, Mongolia og ivaleyst aðra staðni við. Tá hava vit ikki nevnt tey, sum eru trúboðarar aðra staðni út frá øðrum samfeløgum í Føroyum, og tey, sum eru í stutttíðartænastu í fleiri londum og sum eitt nú eru við missiónsskipum, soleiðis sum Dollin var tað fyri hundrað árum síðani.

Hví eru so nógvir føroyingar trúboðarar aðra staðni?

– Gud hevur signað okkara lítla land ríkiliga. Nógv hava funnið frið við Gud, og tað er hugaligt og gleðiligt at staðfesta, at tey eru mong, sum hava verið kallinum líðin. Harrin Jesus segði jú, áðrenn hann fór til Himmals, við lærisveinarnar, at teir skuldu fara út í allan heimin við gleðiboðskapinum. Tryggingin hjá hesum var, at Gud hevði alt vald, og vit kunnu siga, at teirra pensión var, orð Kristusar, at "Eg eri við tykkum allar dagar inntil enda tíðarinnar".

gult25 cyan25 magenta25 svart25



## Supply hevur stóran týdning

Síðani vit fóru at hoyra um oljuvinnuna í Føroyum, er supply vorðið eitt alt meiri kent og viðkomandi orð. Øssur Berghamar vísir á, at hetta sama hugtakið hevur stóran týdning í trúboðanarverki:

– Veitingarnar heimanífrá eru alneyðugar. Tað er lívsneyðugt, at tey, sum eru heima, minnast tey í bøn, sum eru farin út við evangelinum, og at tey, sum eru farin aðra staðni við evangelinum, stuðla trúboðanini og trúboðarunum. Týdningurin av hesum varð nógv undirstrikaður á stevnuni á Skálafjørðinum, og tað var sera viðkomandi. Tað er ein forrættur at vera við í trúboðanini, og tann forrættin eiga ikki bara tey, sum verða nevnd fulltíðar trúboðarar, lut í, men øll, sum á so sera ymiskan og fjøltáttaðan hátt stuðla trúboðanini og trúboðarunum, lut í. Vit eiga at vera trúboðarar, sum boða tað, ið okkum er givið, og sum á gravsteininum á grøvini hjá D. J. Danielsen í kirkjugarðinum undir Svínaryggi, so vildi eg ynskt, at tað kundi verið sagt um okkum, at vit vóru óræddir hermenn Harrans, ella sum tað hevur verið sungið í Zarepta í mong ár "Eg eri við í Guds heri og stríðist fyri sannleikan", endar Øssur Berghamar.

Í dag fara hann og eingilska kona hansara, Susan, aftur til Keypmannahavnar at halda fram í kristiliga og sosiala arbeiðnum, sum tey síðani 1973 hava gjørt út frá Kristnastovu á Birmavej á Amager. Saman við teimum arbeiða í fulltíðar starvi eldri sonur teirra Andrew og kona hansara Sara.



*Systkinabørnini Øssur Berghamar og Símun í Túni hava í tilsamans meira enn eina hálva øld verið trúboðarar uttanlands*

*Mynd: Judith Johannesen*

# Kring allan knøttin

Føroyingar eru at finna alla staðni, plagar at verða tikið til. Eisini innan trúboðan arbeiða nógvir føroyingar aðra staðni í heiminum. Á stevnuni, sum á páskum var í ítróttarhøllini í Runavík, vóru yvirlit, sum vístu, hvagar fólk, sum eru knýtt at brøðrasamkomunum í Føroyum, eru farin við tí endamálinum at kunngera evangeliið og at taka lut í kristiligum arbeiði annars. Summi av hesum eru í fulltíðar trúboðanarstavi, meðan onkur eisini hava annað arbeiði, alt meðan tey eru í trúboðanarverki.

Í hesum yvirlitinum eru ikki tey, sum starvast í og út frá samkomunum heima á landi, og tey, sum eru uttanfyri landoddarnar eitt avmarkað tíðarskeið, t. d. tey sum starvast innan trúboðanarfelagsskapin OM.

DANMARK
Keypmannahavn
Andrew og Sara Berghamar
Øssur og Susan Berghamar
Valdemar og Ruth Lützen

Hirtshals
Virgar og Ella Jacobsen
Levi og Greta Joensen

ÍSLAND
Jógvan og Rósa Purkhús
Nils og Andrea Stórá

GRØNLAND
Qaqortoq
Jørundur og Linda Hansen

Paamiut
Bárður og Jóhanna Ljósheim
Tryggvi og Lena Neshamar

Nuuk
Hans og Jonna Sivertsen

Ammassalik
Niels og Miriam Vang

USA
Óli á Grømma og Judy Jacobsen
John og Gudny Munro

MEKSIKO
Inga McKendry

VENESUELA
Ingvard og Erla Lómstein Petersen
Jóhannes Frants Poulsen
Símin og Dania í Túni

SENEGAL
David og Anna Rodda

GUINEA
Hans Arni og Marion Jensen

RUSSLAND
Ivor og Guðrun Tutty

FILIPSOYGGJARNAR
Ragnar og Liz Niclasen
Jógvan Júst og Cathy Rasmussen

PAPUA Ný GUINEA
Peter og Rachel Hansen
Poul og Carol Joensen
Sonne og Julie Poulsen

MONGOLIA
Dan og Christy Jacobsen



*Frá framsýningini*

*Mynd: Judith Johannesen*



*Susan og Øssur Berghamar hava verið í Danmark síðani 1972*

*Mynd: Judith Johannesen*